# Fundast um 2. útbjóðing

ÚTBJÓÐING
*Jan Müller*

Síðani Oljufyrisitingin fór aftur av bakkastokki nú um dagarnar hevur verið ávist fundarvirksemi í sambandi við 2. útbjóðing. Sosialurin skilur, at eitt nú Oljuvinnufelagið undir Vinnuhúsinum og FOÍB, felagið hjá oljufeløgunum hava lagt síni sjónarmið fram fyri umboð frá Oljufyrisitingini um 2. Útbjóðing. Í dag verður fundur við umboð fyri fiskivinnuna og umhvørvismyndugleikar. Hetta er alt liður í tilrættaleggingini av eini nýggjarí útbjóðing og líkist tí mannagongd, sum varð undan 1. útbjóðing, har ymsir myndugleikar og vinnan vórðu eftirspurd. Hetta verður so partur av grundarlagnum undir tí tilmæli og lógaruppskoti, sum landsstýrismaðurin um stutta tíð fer at leggja fyri løgtingið

**Førleikamenning tilsamans (pr. ultimo 2003)**

| | Vinna | | | | | | | Útbúgving | | | | Til-samans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Menning útg./framl. | Góðsku-stýring | Leiðslu-menning | Gransking | Venjing/ upplæring | Annað | Vinna tilsam. | Útbúgving | Annað | Útb. tilsam. | Annað | |
| Anadarko | 85 | 0 | 0 | 600 | 300 | 15 | **1.000** | 500 | 0 | **500** | **0** | **1.500** |
| BP/Shell | 5.312 | 100 | 305 | 212 | 4.431 | 410 | **10.770** | 3.236 | 210 | **3.446** | **2.301** | **16.517** |
| ENI/Føroya Kolvetni | 0 | 0 | 0 | 0 | 10.001 | 0 | **10.001** | 0 | 0 | **0** | **0** | **10.001** |
| Faroes Partnership | 1.339 | 350 | 31 | 1.684 | 2.093 | 790 | **6.287** | 567 | 857 | **1.424** | **0** | **7.711** |
| Statoil-bólkurin | 0 | 445 | 0 | 0 | 27 | 0 | **472** | 10.670 | 79 | **10.749** | **0** | **11.221** |
| | **6.736** | **895** | **336** | **2.496** | **16.852** | **1.215** | **28.530** | **14.973** | **1.146** | **16.119** | **2.301** | **46.950** |







*Talvan vísir okkum eina uppgerð yvir, hvat er latið til førleikamenning frá oljufeløgunum hesi fyrstu trý árini síðani oljuloyvi vórðu latin.*

# Vinna og útbúgving fara við tí mesta

FØRLEIKAMENNING
*Jan Müller*

Vinnan og so útbúgving fara við meginpartinum av pengunum, sum oljufeløgini hesi fyrstu trý árini hava játtað til førleikamennning. Í eini uppgerð, sum Oljufyristingin hevur gjørt fram til 1. Januar eru latnar knappar 30 mió. kr. til vinnuendamál og góðar 16 mió. kr. til útbúgvingarendamál, meðan góðar 2 mió. eru latnar til annað.

Taka vit so vinnuna, er tann størsti parturin farin til venjing og upplæring, umleið 17 mió. kr., meðan menning eitt nú í samband við framleiðslu er farin við umleið 7 mió. kr. Á talvuni omanfyri sæst, at eitt øki sum leiðslumenning er bert farið við 336.000 kr. Hví so er er ilt at meta um, men við Sosialin í vikuni segði Petur Joensen á Oljufyrisitingini, at tað er tankavekjandi, at hesin parturin er so undirumboðaður.

Samlaða játtanin, ið tey fýra oljusamtøkini: BP/Shell, Faroes Partnership, Statoilbólkurin, ENI/Føroya Kolvetni og Anadarko hava latið, eru uppá 85 mió. kr. Av hesum eru brúktar umleið 47 mió. kr fram til árslok. BP/Shell letur størstu upphæddina við at rinda umleið helvtina ella 40 mió. kr. tril førleikamenningina. Næst er Faroes Partnershp við umleið 18 mió. kr. og í hølunum kemur so Statoilbólkurin.

UMBOÐSRÁÐSVAL 2004



## Valúrslit

**fyri Umboðsráðið í Ognarfelag Tryggingartakaranna**

TEY 11 VALDU UMBOÐINI:

1. Ingeborg Godtfred, Argir — 566 atkvøður
2. Jákup Egholm Hansen, Sandavágur — 435 atkvøður
3. Árni Jakobsen, Tórshavn — 271 atkvøður
4. Elin Heðinsdóttir Joensen, Tórshavn — 258 atkvøður
5. Jógvan Durhuus, Vestmanna — 236 atkvøður
6. Hervør Hergudóttir, Bøur — 180 atkvøður
7. Herman Winther, Skopun — 169 atkvøður
8. Marin í Dali, Tórshavn — 169 atkvøður
9. Jona Ulrikka Nielsen, Klaksvík — 161 atkvøður
10. Ronald Poulsen, Tórshavn — 129 atkvøður
11. Poul Johannes Joensen, Vágur — 124 atkvøður

VALSKEIÐIÐ

Valið er galdandi í fýra ár. Valskeiðið verður roknað frá 12. mars 2004, ið er fyrsta almannakunngering av valúrslitinum.

Víst verður til lýsing í bløðunum um miðjan januar um val til umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna.

Tórshavn, 12. mars 2004
Stjórnin

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

Kongabrúgvin · Postsmoga 329 · FO-110 Tórshavn · Tel 345600 · Faks 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo

www.sansir.fo



NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK MARS 2004**

## SKRÁIN VIKA 10–11

**Fríggjadagur 12. mars**
**Kl. 19.30** **Sangleikurin “Josef og ótrúliga litfagra dreymakotið.**
**Kostn. Kr. 150.-**

**Leygardagur 13. mars**
**Kl. 16.00** **Sangleikurin “Josef og ótrúliga litfagra dreymakotið.**
*(eykasýning)* **Kostn. Kr. 150.-**

**Kl. 19.30** **Sangleikurin “Josef og ótrúliga litfagra dreymakotið.**
**Kostn. Kr. 150.-**

**Sunnudagur 14. mars**
**Kl. 16.30** **Sangleikurin “Josef og ótrúliga litfagra dreymakotið.**
*(eykasýning)* **Kostn. Kr. 150.-**

**Kl. 19.30** **Sangleikurin “Josef og ótrúliga litfagra dreymakotið.**
**Kostn. Kr. 150.-**

**Mánadagur 15. mars**
**Kl. 19.30** **Sangleikurin “Josef og ótrúliga litfagra dreymakotið.**
*(eykasýning)* **Kostn. Kr. 150.-**

**Týsdagur 16. mars**
**Kl. 19.30** **Sangleikurin “Josef og ótrúliga litfagra dreymakotið.**
*(eykasýning)* **Kostn. Kr. 150.-**

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00 og sunnudagar kl. 14.00-17.00**

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**

Sosialurin 341800



# Oljupengar til golfútbúgving skal gagna ferðavinnu



*Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess: - Umsóknin til golfútbúgving lýkur treytirnar fyri at lata stuðul til førleikamenning, nú ætlanin við hesum tiltaki er at menna møguleikarnar hjá ferðavinnuni*

FØRLEIKAMENNING
*Jan Müller*

Nú tosað verður um at fáa fleiri ferðafólk til Føroya eru mong hugskot og ætlanir frammi. Ein av teimum nýggjastu er at byggja golfvøll/fasilitetir í høvuðsstaðnum og menna møguleikarnar hjá eitt nú útlendingum, sum koma henda vegin, fyri at gera golf til ein part av ferðini í Føroyum. Við hesum í huga varð herfyri søkt um játtan frá oljufeløgunum um at útbúgva ein føroying til at taka sær av at umsita ein golfvøll og tí hartil hoyrir. Og herfyri vórðu pengar játtaðir av kontoini til førleikamenning til golfútbúgving í Skotlandi. Talan er um eina trý ára útbúgving á "University of Highlands and Islands" í Cape Ness í Norðurskotlandi. Talan er um eitt skeið í Golf Facility Management. Tvs. at kunna stjórna einum golfvølli/fasilitetum, og í hesum førinum er talan um ein komandi golfvøll , sum er í umbúnað.

Í grundgevingunum fyri at lata stuðul (sum Sosialurin hevur fingið innlit í) stendur m.a. at golfítrotturin veksur við rúkandi ferð í okkara grannalondum. Í Íslandi eru 60 golfbreytir og í Hetlandi tríggjar. Golf er ikki bert ein ítróttur, tað er vorðin ein heimsumfatandi vinna. Tróshavnar Golfklubbi hevur í nøkur ár havt eitt ávíst virksemi og nú er ætlanin at betra um umstøðurnar. Ásannað verður, at ein nýggj og størri golfbreyt vil ivaleyst hava stóran týdning í tí framhaldandi menningini av føroysku ferðavinnuni. Men um ein breyt skal rekast á skilabesta hátt er týdnignarmikið, at fólkini ið standa fyri hava hollan kunnleika innan golf. Tað er tí sambandi at ein føroyingur umhugsar at læra innan "Golf Management".

Stuðlað verkætlanini hava Amerada Hess og BP. Eisini Oljufyrisitingin hevur tikið undir við ætlanini m.a. grundað á: at talan er um ætlan, ið kann stuðla undir golf sum komandi vinnuveg.

Vit spurdu Ben Arabo, stjóra í Amerada Hess, hvat orsøkin er til, at ein so óvanlig verkætlan sum henda verður stuðlað. Hann sigur, at talan er ein útbúgving, sum hevur vinnuligar møguleikar í sær. -Er hetta ein førleiki, sum kann geva kommerciellar møguleikar í Føroyum og fyri ferðavinnu, so kvalifiserar tað til førleikamenning. Vit síggja hetta fyrst og fremst sum eitt ferðavinnuprojekt sigur Ben Arabo. Talan er ikki um at geva einum persóni stuðul til at spæla ítrótt men at standa fyri eini verkætlan, sum skal kunna koma ferðavinnunu í Føroyum til góða. Ben Arabo sigur, at hetta snýr seg um at menna ein førleika í tí sum er "Golf Facility Management". Er tað ein førleiki, sum kann geva ferðavinnuni inntøkumøguleikar, so lýkur tað avgjørt treytirnar fyri at játta pengar. –Vit fara annars ikki at seta okkum sum dómarar fyri, hvat slag av vinnu skal hava stuðul.

## Starvsfólk

**til Sunset Boulevard í SMS**



### Aftaná skúlatíð

Søkt verður eftir fólki M/K at arbeiða nakrar tímar um vikuna - eftir skúlatíð og í vikuskiftunum - at byrja skjótast tilber. Eitt sera vælegna starv hjá teimum lesandi.

Ert tú opin, virkin og røkin, so ert tú kanska ein av teimum, vit leita eftir. Vit vænta, at tú eins og vit eru tilreiðar at veita kundum okkara eina skjóta og góða tænastu.

Vit læra teg á staðnum...

### Hálva tíð

Søkt verður fólki M/K at arbeiða hálva tíð - um dagin, kvøldið og í vikuskiftunum - at byrja skjótast tilber.

Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða við fólkum, so er hetta júst nakað fyri teg. Tú gerst partur av einum vælleikandi liði við nógvum starvsfólkum í einum nógv vitjaðum umhvørvi.

Vit læra teg á staðnum...

### Fulla tíð

Søkt verður fólki M/K til fulltíðarstarv - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara. Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

**Send umsóknina til:** Sunset Boulevard, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2004.

*Sunset Boulevard • SMS • Postboks 1059 • FO-110 Tórshavn*

petur & petur • 320870